# Nøvn

## Andlát

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara elskaði maður, pápi, abbi og verfaðir

**Berg Zachariasen**
**ættaður úr Vestmanna**
**búsitandi í Fløng í Danmark**

andaðist í heiminum 4. august, 76 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Fløng kirkju týsdagin kl. 13.oo

**Elsa**
**Svend-Otto og Agi**
**Einar og Miriam**
**Astrid og Magni**
**Julia og Maria**
**Jacob og Elsa Maria og**
**Selma og Simon**

## Andlát

Elskaði maður, pápi, abbi, langabbi og svigarpápi okkara

**John D. Hammer**
**Tvøroyri**

andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi mánadagin 2. august, 85 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjadagin 6. august kl. 18.00 í Tvøroyrar kirkju. Jarðarferðin verður leygardagin 7. august kl. 13.00 úr Tvøroyrar kirkju.

*Vegna tey avvarðandi*
**kona og børn**

Tey ið ynskja at minnast John við blómum ella kransi, kunnu ístaðin lata Missiónshúsinum á Tvøroyri eina peningagávu, konto í peningastovnunum.

## Prógv



Ruth Nolsøe Reinert hevur tann 19. juli 2010 lokið prógv sum Master of Science í Advertising and Public Relations Management á De Montfort University í Leicester, Onglandi.



28. juni 2010 fekk Birgitta Andreasen, Tórshavn, prógv sum Master of Chemistry with Honours Chemistry with Materials Chemistry and Industrial Experience, frá The University of Edinburgh.

## Andlát

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæri bróðir, svágur, mammubeiggi og ommubeiggi

**Henry Kock Binderup**

andaðist í Keypmannahavn ólavsøkudag, 59 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr kirkjugarðs-kapellinum sunnudagin kl. 14.00

*Fyri tey avvarðandi,*
**Lis og Súsanna**
**v/familjum.**

## TØKK

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá okkara kæra

**Gunnleyg Kathrina Reynslág**
**(fødd Joensen)**
**Oxie**

andaðist og varð jarðað.

Takk til prest, kirkjutænarar, gravarar, Sumbiarkórið, Juttu og Edith og tykkum øll, sum á ein ella annan hátt hjálptu til.
Takk fyri blómur, kransar, heilsanir og peningagávur.
Tøkk til tykkum, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
***Ólavur, Marianna og Hargin***

# Varðhaldsfongslaður fyri medisinstuldur

**INNBROT Maðurin, sum løgreglan hevur undir illgrunað fyri í tveimum umførum at hava brotið seg inn á Landssjúkrahúsið er handtikin**

Maðurin, sum illtonktur er fyri at bróta inn á Landssjúkrahúsið – fyrst psykiatrisku deild og síðani ambulatoriið – varð seinnapartin í gjár varðhaldsfongslaður fram til 1. september.

Maðurin breyt um vikuskiftið inn á psykiatrisku deild, har hann stjól hálvthundrað tablettir av. Týsmorgunin fekk løgreglan aftur eina fráboðan um ein óbodnan gest, hesaferð á ambulatoriinum.

Seinnapartin týsdagin varð ein maður handtikin og í gjár varð so staðfest, at hann skal varðhaldsfongslast til 1. september.

rolant@sosialurin.fo